## Hansara egnu ivast

Fleiri leiðandi limir í Vinstraflokkinum í Danmark siga seg ivast í, at Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri og floksformaður, er førur fyri vinna tað næsta fólkatingsvalið. Millum teirra, sum ivast, eru fleiri fólkatingslimir hjá flokkinum og enntá eisini einstakir ráðharrar. Tað skrivaði Politiken í gjár og vísti til eina týðandi keldu í Vinstra. Keldurnar siga, at Lars Løkke Rasmussen hevur ikki megnað at geva eina klára mynd av tí, sum stjórnin ætlar. Ein annar trupulleiki er, at hann hevur givið tí konservativa flokkinum alt ov stórt pláss á pallinum ístaðin fyri at steðga teimum.



## Skip misti eiturbingju

Eitt finskt farmaskip misti leygardagin fýra bingjur í havið stutt sunnan fyri svensku oynna Gotland. Tær fýra bingjurnar stóðu stáplaðar á dekkinum á farmskipinum, sum var á veg til St. Pætursborg í Russlandi. Ein talskvinna fyri svensku sjóverjuna segði í gjár, at fimm tons av eldfimum evnum, sjey tons av umhvørvisskaðiligum evnum og átta tons av ýmsum umhvørviseituri vóru í einari av bingjunum. Flogfør hjá svensku sjóverjuni leitaðu eftir bingjunum leygardagin, men funnu tær ikki.

# Tróndur í Gøtu skal verða títt navn

**Leygardagin var Tróndur í Gøtu doyptur, og gummurnar fegnaðust**



*Laura Hentze og Dagmar Jacobsen eru gummur Trónd í Gøtu. Tær standa her saman við Knud Karstensen, stjóra á Karstensens Skipsværft*

**DÓPUR**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

So væl bygt eitt far og so vøkur ein skúta og eru her komin, teg at heiðra og njóta, at løtan er komin, tú skjótt fer avstað. Vit biðja at harrin má signa tann dag.

Ansa øll tey, ið við tær skulu vera. Vit biðja og ynskja tú má aftur tey bera.

Førið tit saman mangan fongin í havn.

Tróndur í Gøtu skal vera títt navn.

Tað søgdu gummurnar, Dagmar Jacobsen og Laura Hentze, beint áðrenn tær sendu fløskuna avstað, sum fór í sor leygardagin.

So var Tróndur í Gøtu doyptur.

Gummurnar báðar kenna dópin, sum eina stóra æru.

– Hetta er stórt. Tað er ikki øllum beskorið at vera gumma at einum skipi, sigur Dagmar Jacobsen, gumma og kona tekniska leiðaran, Dávið Jacobsen.

– Ja, eg sigi sum Dagmar. Hetta er stórt. Vit hava havt mangar góðar løtur saman við gamla Tróndi í Gøtu, og nú verður spennandi at vita, hvussu verður við tí nýggja, sigur Laura Hentze, gumma og kona Jógvan Hentze, partaeigara.



*Fløskan brotnaði væl og virðiliga*

## Reyðar pylsur í dópinum



*Kári Hansen frá Gøtugjógv fær sær reyðar pylsur og breyð*

Tá Tróndur í Gøtu var doyptur í Skagen leygardagin bjóðaði Karstensens skipasmiðjan til ein bita aftaná.

Ofta verður boðið til pinnamat aðrastað, men hjá Karstensens, sum hava bygt skip í fleiri hundrað ár, er menu'in altíð reyðar pylsur og breyð, og tað hevur verið tradition í langa tíð á skipasmiðjuni.

**-eij**



*Tað vóru fleiri føroyingar komnir til dóp hjá Tróndi í Gøtu*